# Sermerktu SIC?




**– Í Føroyum er ikki pláss fyri okkum. Vit ynskja bara at sleppa at vera, júst sum vit eru, og halda tað vera púra óneyðugt at øsa seg upp, um onkur broytir seg eitt vet frá vanligu siðvenjunum. Soleiðis ljóðar greiða útsøgnin frá harðasta tungmálmsbólkinum í Føroyum, Sic**

Lív Højsted Horsdal
horsdal@sosialurin.fo

Føroyski tungmálmsbólkurin SIC, ið fyri stuttum luttók í hálvfinaluni í Danish Metal Grand Prix 2006, er nakað heilt fyri seg. Teir hava ein sermerktan klædnastíl, sermerktan tónleik – ja, í roynd og veru eru teir eitt vet øðrvísi enn føroyingar flestir. Men ger tað nakað?... Planet.fo fekk eitt prát vit hørðu kjarnuna eitt kvøldið í Miðlahúsinum.

## Ætla ikki at spæla í Føroyum

Næstu tíðina ætla SIC ikki at spæla konsertir í Føroyum, men heldur ynskja teir at fara út um heimlandið at royna seg:

– Hóast vit í Føroyum í løtuni hava einar 50 ómetaliga trúfastar fjepparar, fáa vit ikki tað burturúr, vit ynskja, við eittans at spæla her. Tað er á ein hátt ikki pláss fyri okkum í lítla og snævurskygda føroyska samfelagnum. Men tá vit koma aftur við okkara stóra plátusáttmála frá t.d. Roadrunner Records, kunnu trúføstu áhoyrararnir her heima gleðast og vera stoltir, tí teir stuðlaðu okkum av fyrstan tíð. Í roynd og veru er dreymur okkara at verða so víðagitnir, at størstu tónleikabólkarnir fara at hita upp, áðrenn vit koma á pall.

Menninir í Sic vilja allarhelst sleppa at spæla í Týsklandi, Hollandi og USA - serliga á Ozzfest festivalinum. So ætla teir allir at búgva saman í eini stórari borg, har eftirspurningurin er ovurstórur eftir júst teirra tónleiki. Men tað eru ikki einans tær stóru peningaupphæddirnar, ið lokka:

– Vit vilja fegnir hjálpa menniskjum við okkara tónleiki soleiðis, at tey á tann hátt kunnu seta seg sjálv í samband við tónleikin. Eisini vilja vit prógva fyri teimum svartskygdu føroyingunum, ið enn hava ta fatan, at tað einasta rætta er at fara til skips, at tað veruliga ber til at liva av tónleiki.

## Hvør lurtar eftir teirra tónleiki?

– Øll ung, ið hava virðing fyri tónleiki, ið stendur á tamb av hvítanýrum. Men tá vit á Planet.fo spyrja, hvat tað merkir, flenna teir allir leingi og hart.

– Okkara tónleikur er fullur av orku, vit eru rótleysir og leggja ikki fingrarnar ímillum nakrastaðni og hava heldur einki filtur, ið sílar frá. Vit hava eina kenslu av, at nógv, ið koma til konsertirnar hjá okkum, eru slík, ið kanska hava havt eina vánaliga viku, og so sleppa tey rættiliga at sleppa sálarliga trýstinum av sær, tá vit byrja at spæla.

## Ikki 'satanistar'

Teir í Sic ynskja rætt og slætt bara at sleppa at vera, sum teir eru. Og halda teir seg ofta vera misskiltar:

– Vit halda tað vera óneyðugt møsn, at tað skal níva fólk so nógv, um onkur broytir seg eitt vet frá vanligu siðvenjunum her á landi. Bara tí, vit onkuntíð mála okkum svartar um eyguni, merkir tað ikki, at vit eru 'satanistar'. Okkara tónleikur er eittans grundaður á persónligar kenslur og upplivingar úr dagligdegnum í nútíðarsamfelagnum, og tískil ikki nakran devulskap. Vit verða eisini ofta álopnir av fólki á gøtuni, ið koma við býttum ákærum, men í roynd og veru leggja vit einki í tað – tað má vera teirra trupulleiki.

## Sermerktan klædnastíl

Aloftast føra SIC fram á palli í sermerktum klæðum og smyrsli – m.a. í løgreglujakka, fyrikləði, kilti o.ø., ið tykist at vera rættiliga skitið og rokk'n'roll kent:

– Vit hava eingi sonevnd 'stageklæðir', men heldur spæla vit ofta bara í okkara vanligu klæðum, ið flest øll halda vera ógvuliga sermerkt. Vit hava ein tílíkan klædnastíl, tí okkum dámar tað, og annars klæða vit okkum bara í tað, ið hóskar til upphæddina á bankakonto'ini.

## Sermerkt ljóðmynd

Sum flestum kunnugt hava SIC eina ógvuliga sermerkta ljóðmynd, ið er sera ágangandi og orkumikil, og tá SIC trína á pall og byrja at spæla, vita øll rætt og slætt beinanvegin, hvør spælir. Limirnir í bólkinum halda tað eisini vera sera umráðandi at vera tilvitaður um ljóðmyndina:

– Tá vit gerast kendir, so skulu øll í heiminum kenna okkara sermerkta ljóð. Og tað, ið dregur fram serligu ljóðmyndina, er útgerðin. M.a. nýta vit eina serliga samanseting av gittaraeffektum, sjeystreingjaðar gittarar, ið eru stemmaðir niður í A, styrkjarar, ið leggja dent á tað tunga ljóðið o.s.fr.

## Samanhaldið er drívmegin

Í SIC eru teir allir á einum máli um, at samanhaldið avgjørt er drívmegin í bólkinum. Teir eru saman 15-20 tímar um vikuna og verða hálvavegna friðleysir, um teir ikki hava sæð hvør annan í eina heila viku:

– Vit hava altíð umsorgan fyri hvørjum øðrum, og samanhaldið styrkist hvønn dag. Eisini stuðla vit altíð hvørjum øðrum 100 %, og um ein av okkum hevur ein ringan dag, verður hann fyrst østur upp, til hann gerst garvillur – so er 'bumban' brostin og trupulleikin nærum loystur. Eisini berjast vit altíð fyri stuttleika, og á henda hátt styrkja vit kærleikan til hvør annan og sleppa samstundis av við møguliga vreiði. Aftaná felags bardaga ganga venjingarnar altíð túsund ferðir betur.

Tó er tað ikki soleiðis, at teir ongantíð eru firtnir inn á hvør annan – tvørturímóti:

– Tað eru vit rættiliga ofta, men ongantíð leingi. Vit práta altíð beinanvegin um trupulleikarnar og eru erligir hvør móti øðrum, so tað er ongantíð nakar trupulleiki.

## Hesir manna bólkin SIC:



*– Eddie Jacobsen: gittarleikari – 23 ár ("'riffklókur', illsintur og droymandi")*



*– Mikkjal Gaard Hansen: – sangari – 24 ár – ("óskipaður, avgjørdur og skilagóður")*



*– Magnus Hansen: – 27 ár – trummusláari & stuðulssangari ("speiskur, stuttligur og einvaldur")*



*– Frans Galán: – 17 ár – gittarleikari & stuðulssangari ("lítli beiggi, rótleysur og ágrýtin")*



*– Gudmar Hansen: – 23 ár – bassleikari ("'rubberface', brennivargur og markleysur")*

*– Claus Rasmussen: – 23 ár – hjálparfólk/'roadie' ("jarðbundin, trælur og ómissandi")*

